# Nýggjur Ford Transit í august




*Størstu broytingin framman eru nýggjur kúfangari, kølaragittar, lyktir og størsta Ford-búmerki (ovalurin) í evropeiska modell-programminum*

**Í august kemur ein nýggjur uppdateraður Ford Transit á marknaðin. Størstu broytingarnar eru framman og í kabinuni. Eisini vera tveir nýggir Duratorq TDI dieselmotorar við í programminum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ford kundu í fjør hátíðarhalda at 40 ár vóru liðin síðan Ford Transit fyrstu ferð kom á marknaðin.

Tað eru nú nøkur ár síðan hesin Transit, sum nú fær eina sonevnda facelift, kom á marknaðin. Tað sum eyðkennir bilin eru tær loddrøttu síðurnar og rúmliga vørurúmi.

At síggja til er størsta broytingin framman við nýggjum kúfangara, kølaragittari, lyktum og tí størsta Ford-búmerkinum (ovalinum) í evropeiska modell-programminum.

Kabinan er nýggj við nýggjum instrumentborði og ratti og nú situr girstongin í sjálvum instrumentborðinum.

Seks ymiskir dieselmotorar vera at velja ímillum, harav tveir eru nýggir: 2,2 litur og 2,4 litur Duratorq TDI við antin fimm ella seks-trins girkassa.

Transit er bert tann fyrsti av fleiri nýggjheitum frá Ford í ár, seinni koma ein nýggjur S-MAX og Galaxy. Nýggi Ford Transit kemur á marknaðin í august.



*Kabinan er nýggj við nýggjum instrumentborði og ratti - nú situr girstongin í sjálvum instrumentborðinum*

Sp/f Super Dekk:

# Goodyear umboð á vitjan

**Goodyear sølustjórin Carl Ole Olofsen, sum seinastu meira enn 25 árini hevur vitjað hendan vegin, gevst nú hjá Goodyear, men hóast tað hevur ongar ætlanir um at gevast við at koma til Føroyar**



*Fríðrikur Bláhamar frá Sp/f Super Dekk, Goodyear umboðsmaður í Føroyum, og Lars Gladov, nýggjur sølustjóri hjá Goodyear í Danmark*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*




*Torben Nielsen, tekniskur ráðgevi hjá Goodyear, og Carl Ole Olofsen, sølustjóri, sum nú gevst hjá Goodyear*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

DEKKSØLA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Goodyear dekkfyritøkan sendir javnan sølufólk og tekniskar ráðgevar til Føroyar, Ísland og Grønland, at vitja teirra kundar og søluumboð.

Ein av teimum, sum hevur vitjað hendan vegin í meira enn 25 ár, er Carl Ole Olofsen, sølustjóri, sum hesi árini hevur fingið nógv vinfólk í Føroyum.

Carl Ole, ið er 63 ára gamal, gevst nú hjá Goodyear, men hann hevur ætlanir um at koma aftur til Føroyar at vitja. Eitt nú í samband við at Norðoyartunnilin letur upp síðst í apríl.

Nakað síðan hevði Sonne Smith samrøðu við Carl Ole Olofsen á Rás2, har hann segði frá, hvussu tað var at koma til Føroyar fyrstu ferð, og hvussu infrastrukturin er broyttur hesi árini.

Í hansara stað eru komnir tveir aðrir mans, tað eru Lars Gladov, sølustjóri, og Torben Nielsen, tekniskur ráðgevi. Teir hava verið her og sett seg inn í føroysku viðurskiftini hvat akførum, dekkmarknaði og veganeti viðvíkur.

Goodyear umboðsmenninir siga, at vit hava eitt framúr gott veganet, og tað at vit skjótt kunnu koyra úr Vágum til Klaksvíkar, halda teir vera eitt stórt framstig á samferðsluøkinum.

Goodyear er tað dekkmerki, sum man hava verið selt longst í Føroyum, heilt síðan fyrst í 30-unum, tá P/F Vilhelm Nielsen var umboð fyri Goodyear.